

## Nýggi Lómur til reiðar

Kappróður: Hóast nógvir raskir menn og raskar kvinnur hava sitið við árarnar umborð á 6-mannafarinum "Lómur" á Argjum, hevur báturin bert vunnið tvær stevnur, eina í 1995 og eina í 2005. Hetta var við kvinnum, men Lómur hevur ongantíð vunnið ein róður við monnum. Men vónirnar í ár eru góðar, og við nýggjum og vælgjørdum báti fara teir umborð á Lómi um ikki annað, eftir einum medalju plássi, skrivar heimasíðan hjá Argja Róðrarfelag. Hetta skuldi helst givið teimum frammi í oddinum ein skarpan gang, men sum teir eisini viðganga, so er 6-mannafarsróðurin ein harður róður, har teir eru uppi ímóti fleiri royndum 6-mannafarsrógvarum. Tað ljóðar at bæði Riddarin og Tvørabáturin hava sligið seg saman. Hetta eru manningar, ið hava verið frammi í oddinum í fleiri ár.

**Royndir rógvarar**
Um Lómin sigur felagið, at har eru fleiri við ið hava nógv ár í Argja Róðrafelag – m.a. Heðin Olsen, og Meinhard Akraberg Hansen ið báðir vunnu Føroyameistaraheitið við Bliki í fjør og hava róð ið eini 5 ár tilsamans; Folmer Bisp hevur verið í felagnum 7-8 ár, og hevur bæði stýrt og róð í fleiri ár. Tað sama er við Teitur Nielsen, men hann hevur verið burtur frá kappróðri í eini 2 ár, men er nú aftur til dystin fús. So eru tað báðir toftu-menninir, Óla Hendrik av Fløtum og Høgni Jacobsen, ið eru tveir garvaðir menn við eina rúgvu av royndum bæði í 8 og 10 mannaførinum, sum í ár hava valt at taka eitt ár í 6 mannaførunum. Og við róðri situr Lív í Ólastovu Árnastein, sum eisini hevur fleiri ár á baki, bæði sum rógvari og róðurskvinna. Lómur við kvinnum er hinvegin ikki mannaður í ár.

# Á eggini



Nú sleppur Høgni at royna sín politiska samstarvsførleika

## Í MORGIN

7/9°C



11-12 m/s 11-12 m/s

Útsynningur 11 m/s, ælaveður fyrrapartin og um kvøldið, turt seinnapartin. Hitin millum 7 og 9 stig.

## SUNNUDAGIN

5/8 °C



11-12 m/s 11-12 m/s

Útsynningur 11-12 m/s, ælaveður fyrrapartin, men hann slítur í seinnapartin. Hitin 8 stig.

## MÁNADAGIN

5/8 °C



7-10 m/s 7-10 m/s

Framvegis útsynningur, 7-10 m/s, skýggjað men yvirhøvur turt. Hitin 8 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, umleið 975 hpa liggur við eysturstrond Grønlands. Tilhoyrandi hitabrúgvin við Føroyar fer í ein vestan.




Hesar komandi dagarnar fara lágtrýst við Danmarkarsundið og tilhoyrandi brúgvaløg at seta sín dám á veðrið við skiftandi skýlofti, ælaveðri og liggjandi útsynningi.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 88 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | -9 | **Tromsø** | -1 | **Moskva** | -13 | **Athen** | 14 |
| **Reykjavík** | 8 | **Bergen** | -2 | **Berlin** | -6 | **Beijing** | 11 |
| **Tórshavn** | 7 | **Oslo** | -9 | **Paris** | 3 | **New Dehli** | 20 |
| **Lerwick** | 4 | **Stokkhólm** | -6 | **Madrid** | 15 | **Bangkok** | 32 |
| **Aberdeen** | 7 | **Keypmannah.** | -4 | **Róm** | 11 | **Sydney** | -- |
| **London** | 8 | **Helsinki** | -19 | **Malorca** | 15 | **New York** | 2 |

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 11. apríl | Fyrra kvarter |
| 17. apríl | Mánin næstur jørðini |
| 18. apríl | Fullmáni |

Kelda. Álmanakkin 2011

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Dagur** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** |
| 15. apr | 04:51 | 17:14 | 03:51 | 16:14 | 04:06 | 16:29 | 06:51 | 19:14 | 07:51 | 20:14 | 03:06 | 15:29 | 02:06 | 14:29 | 05:06 | 17:29 | 06:06 | 18:29 | 04:36 | 16:59 | 05:51 | 18:14 |
| 16. apr | 05:38 | 18:00 | 04:38 | 17:00 | 04:53 | 17:15 | 07:38 | 20:00 | 08:38 | 21:00 | 03:53 | 16:15 | 02:53 | 15:15 | 05:53 | 18:15 | 06:53 | 19:15 | 05:23 | 17:45 | 06:38 | 19:00 |
| 17. apr | 06:22 | 18:49 | 05:22 | 17:49 | 05:37 | 18:04 | 08:22 | 20:49 | 09:22 | 21:49 | 04:37 | 17:04 | 03:37 | 16:04 | 06:37 | 19:04 | 07:37 | 20:04 | 06:07 | 18:34 | 07:22 | 19:49 |
| 18. apr | 07:17 | 19:45 | 06:17 | 18:45 | 06:32 | 19:00 | 09:17 | 21:45 | 10:17 | 22:45 | 05:32 | 18:00 | 04:32 | 17:00 | 07:32 | 20:00 | 08:32 | 21:00 | 07:02 | 19:30 | 08:17 | 20:45 |
| 19. apr | 08:13 | 20:42 | 07:13 | 19:42 | 07:28 | 19:57 | 10:13 | 22:42 | 11:13 | 23:42 | 06:28 | 18:57 | 05:28 | 17:57 | 08:28 | 20:57 | 09:28 | 21:57 | 07:58 | 20:27 | 09:13 | 21:42 |